Landsbanki Føroya

FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

# Ársfrágreiðing 2023



## Innihald

Fíggjarligt støðufesti í hásæti ................................ 1
Nevnd ................................................................. 1
Starvsfólk ............................................................ 1
Landskassin er bjálvaður ....................................... 2
Gjaldføri landskassans......................................... 2
Fíggjarmarknaðirnir í 2023 í stuttum ............... 4
Skuld landskassans ................................................ 4
Nettoskuld landskassans ..................................... 5
Váðastýring ............................................................ 5
Frítíðargrunnurin ................................................. 5
Kredittvirðið tað sama – Aa2 ................................ 5
Hvør brúkar, hvør sparir, hvør lænir? .................. 5
Búskaparráðið ........................................................ 8
Føroya Váðaráð og systemiskir váðar................ 10
Fíggjarviðurskifti Landsbankans ......................... 12

## Fíggjarligt støðufesti í hásæti

Landsbankin virkar fyri fíggjarligum støðufesti og er fíggjarstovnur hjá landinum. Uppgáva Landsbankans er, umframt at umsita ogn og skuld landsins, at eygleiða og greina fíggjargeiran og búskapin sum heild, og gera vart við fíggjarligar váðar.

Landsbankin hevur fýra høvuðsendamál:

1) Virka fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum
2) Røkja gjaldførið hjá landinum
3) Røkja skuldina hjá landinum
4) Kunna politisku skipanina og almenningin

Ein onnur uppgáva hjá Landsbankanum er at røkja skrivarauppgávuna fyri Búskaparráðið.

Búskaparráðið hevur sum uppgávu:

1) At gera tvær konjunkturfrágreiðingar árliga
2) Harumframt kann ráðið gera temafrágreiðingar og ráðgeva landsstýrinum í øðrum málum

Eisini er landsbankin skrivstova hjá Føroya Váðaráði. Váðaráðið hevur sum uppgávu:

1) at eyðmerkja systemiskar váðar
2) at hava eftirlit við systemiskum váðum

Landsbankin umsitur eisini Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og Búskapargrunnin.

Landsstýrismaðurin setur nevndarlimirnar í landsbankanum eftir tilmæli frá Fróðskaparsetrinum og hann velur eisini formannin.

### Nevnd

Fimm fólk sita í landsbankanevndini:

- Fróði Magnussen, formaður
- Sanna Laksá
- Helena Andreasen
- Jan Otto S. Holm
- Johnny í Grótinum

Nevndin í landsbankanum, er samstundis eisini Búskaparráðið.

Í 2023 hevur nevndin/ráðið havt 29 fundir, harav 6 fundir hava verið í landsbankanevndini, meðan 23 fundir hava verið í sambandi við konjunkturfrágreiðingarnar, herundir virkisvitjanir, og fyrireiking av ráðstevnu. Í onkrum av hesum hevur ikki alt ráðið luttikið, men bara formaðurin. Umframt hesar fundir hevur Búskaparráðið eisini verið á fundi við tingnevndir, tá tær hava biðið um fund við ráðið.

### Starvsfólk

Starvsøkið hjá landsbankanum kann býtast í tvey høvuðsøki: ein bankapart og ein greiningarpart. Bankaparturin arbeiðir við lántøku, skuld og íløgurøkt av gjaldførinum hjá landskassanum, meðan greiningarparturin framleiðir, savnar saman og greinar hagtøl um føroyska fíggjargeiran, og kunnar um týdningarmestu viðurskiftini, ið síggjast í hagtølunum.

Skrivarauppgávan fyri búskaparráðið, sum kom afturat í 2021, hevur fylt nógv hjá nevndini/ráðnum og í umsitingini hjá bankanum. Her tað er serliga konjunkturgongdin og útlit, sum vera lýst. Í mars í 2023 skipaði ráðið fyri eini ráðstevnu um tilfeingisgjøld og í heyst 2023 var arbeitt sera nógv við temafrágreðingini um haldføri, sum var løgd fram 16 januar í 2024.

Í Landsbankanum starvast níggju starvsfólk umframt stjóran. Harafturat, um fíggjarætlanin loyvir tí, eru eisini tímalønt starvsfólk.

## Landskassin er bjálvaður

Lógin um Landsbanka Føroya staðfestir, at landskassin skal hava 15 prosent av BTÚ í minstagjaldføri. Ásetingin kom beint eftir kreppuna í 90-árunum fyri at tryggja, at landskassin í kreppustøðum hevur tøkan pening at rinda lønir, pensjónir og aðrar útreiðslur við.

Minstagjaldførið (tiltaksgjaldførið) er nóg stórt at rinda skyldurnar í umleið seks mánaðir, hóast landskassin ongar inntøkur hevur. Minstagjaldførið í 2023 var 3,4 mia. kr. og er í 2024 3,7 mia. kr.

### Gjaldføri landskassans

Størsti parturin av gjaldføri landskassans er sett í virðisbrøv uttanlands. Landsbankin ger eina íløgustrategi, soleiðis at landskassin fær eitt hóskandi avkast, tó við atliti til váðan og eisini við atliti til, hvussu gjaldførur peningurin er, soleiðis at hann, um neyðugt, skjótt kann gerast tøkur.

Meginparturin verður settur í stats- og real-kredittlánsbrøv (2,1 mia. í miðal í 2023), í altjóða partabrøv (659 mió. kr. í miðal í 2023) og nakað í altjóða lánsbrøv (347 mió. kr. í miðal í 2023). Íløguheimildin hjá Landsbankanum liggur á heimasíðuni www.landsbankin.fo.[1]

Landsbankin kann sambært lógini um landsbankan eisini umsita ogn og skuld hjá almennum grunnum. Upphæddin hjá almennum grunnum í landsbankanum var í miðal 208 mió. kr. í 2023.

Ognin hjá hesum grunnum verður umsitin eftir sama leisti, sum ogn landskassans, og grunnarnir fáa tí sama avkast sum landskassin, tó frádrigið eitt umsitingargjald. Til ber at síggja innlánspolitikkin hjá landsbankanum á heimasíðu landsbankans.

Landsbankin hevur útveitt íløgurøktina til fýra ymiskar norðurlendskar íløgurøktarar. Landsbankin umsitur eisini sjálvur eina íløgurøð við stats- og realkredittlánsbrøvum – hetta fyri at fáa neyðuga smidleikan í gjaldførinum til raksturin hjá landinum.

Ein lítil partur av gjaldførinum er eisini settur í alternativar íløgur, eitt nú í undirstøðukervi, private equity og mikrolán (í miðal 225 mió. kr. í 2023). Sum nakað nýtt er nakað sett í grøn lánsbrøv.

Av gjaldførinum hjá landskassanum stóðu í miðal 142 mió. kr. í Føroyum – hetta er neyðuga upphæddin til dagliga raksturin. Restin er sett uttanlands fyri at tryggja, at landskassin ikki órógvar fíggjarkervið í Føroyum, um kreppa verður.

Tá tað er kreppa er sannlíkt, at eisini peningastovnarnir eru í gjaldføriskreppu. Stendur landskassans peningurin tá í føroysku peningastovnunum fær landskassin ikki brúkt peningin uttan at peningastovnarnir koma í enn størri trupulleikar.

Mynd 1 vísir gongdina í gjaldførinum hjá landskassanum í 2023 (bláa strikan). Eisini sæst miðal gjaldførið fyri alt árið (grøna strikan) og minstagjaldførið (kravið á 15 prosent í gjaldføri av BTÚ, reyða strikan).

[1] Gamalt er, at øll egg ikki mugu leggjast í somu kurv. Soleiðis er eisini við virðisbrøvum – at best er at seta pengar í fleiri enn eitt slag av virðisbrævi. Ein íløgurøð er tí ofta sett saman við ymiskum sløgum av lánsbrøvum (obligatiónum) og partabrøvum. Samansetingin hevur týdning, tí oftast gongur væl við partabrøvum, tá ið illa gongur við lánsbrøvum, og øvugt. Á fakmálið eitur tað at samvariatiónin er negativ, ið merkir at tá tað eina gongur væl gongur hitt illa. Soleiðis verður váðin meira spjaddur og váðin verður minni.

*Mynd 1 – Gjaldførið hjá landskassanum 2023*




Í mai 2021 var landsbankalógin broytt soleiðis, at tá umræður afturrindan ella endurfígging av landskassaláni, kann víkjast frá kravinum um 15% í minstagjaldføri fram til at næsta landskassalán fellur til gjaldingar. Í slíkum føri skal landsins gjaldføri tó ikki minka niður um 13% av BTÚ í undanfarna ári.

Sum myndin vísur, lá gjaldførið frá ársbyrjan til í juni niðanfyri minstagjaldførið (reyðu strikuna). Tí vóru 350 mió. kr. tiknar meira í láni til gjaldføri í juni, tá landskassin tók lán til at endurfíggja lánið á 550 mió. kr., sum fall til gjaldingar í juni. Eftir tað lá gjaldførið um minstagjaldførið til oktobur, tá gjaldførið vaks nógv. Við árslok 2023 var gjaldførið 4,1 mia. kr.

Minstagjaldførið er hækkað frá 3,4 mia. kr. í 2023 til 3,7 mia. kr. í 2024. Minstagjaldførið verður sett til 15% av BTÚ, tvey ár framman-undan, tað vil siga, at minstagjaldførið í 2024 er 15% av BTÚ í 2022. BTÚ vaks frá 2021 til 2022 við 9,5%, og tí vaks minstagjaldførið við 350 mió. kr. frá 2023 til 2024. Við ársenda 2023 var gjaldførið 700 mió. kr. omanfyri minstagjaldførið.

Talva 1 vísir árliga virðisbrævaavkastið hjá landskassanum síðani 2017. Avkastið var gott í øllum árunum, uttan í 2018 og 2022. 2018 var fyrsta árið við negativum avkasti síðani lands-bankin (Gjaldstovan 2013-2017) fór undir hetta virksemið. Her er týdningarmikið at vísa á, at virðisbrævakursir (partabrøv, lánsbrøv, kredittlánsbrøv v.m.) sveiggja hvønn dag.

*Talva 1 – Avkast av gjaldføri landskassans*

| | Avkast % | Avkast mió. kr. |
|---|---|---|
| 2017 | 2,8 | 81 |
| 2018 | -1,4 | -46 |
| 2019 | 6,3 | 192 |
| 2020 | 1,9 | 74 |
| 2021 | 3,8 | 144 |
| 2022 | -8,6 | -293 |
| 2023 | 6,7 | 222 |
| **Miðal 2017-2023** | **1,6** | **54** |

Hækkar kursurin, fær landskassin meira fyri virðisbrævið, um tað verður selt. Minkar kursurin, fær landskassin minni. Avkastið av íløguróktini sveiggjar meira ella minni frá einum ári til annað, og tað sást í 2018, 2019 og ikki minst í 2022.

Talva 1 vísir avkastið av íløguróktini fyri hvørt ár. Men fyri at meta um, hvørt ein íløgustrategi er góð, er rættari at hyggja at miðalavkastinum yvir nøkur ár. Síðani 2017 hevur miðal av-kastið verið 1,6 prosent ella 54 mió. kr. um árið. Tað er serliga 2022, sum hálar miðalavkastið niður, men avkastið var gott í 2023 og hálar tí miðaltalið uppaftur.

Í talvu 2 sæst miðalavkastið av ymsu virðisbrøvunum, sum landsbankin hevur gjørt íløgur í í 2023. Í øllum aktivklassum er avkastið positivt.

Pengar, sum landskassin hevur standandi á bók í Føroyum, verða brúktir til dagliga raksturin hjá landinum. Hesir eru ikki við í talvu 2.

*Talva 2 – Avkast av íløgurøð landskassans og grunnum í 2023, býtt á virðisbrævasløg.*

| | Miðal íløga mió. kr. | Avkast mió. kr. | Avkast % | Býtið % |
|---|---|---|---|---|
| Partabrøv | 659 | 99 | 14,9 | 18,8 |
| Statslánsbrøv | 34 | 2,0 | 6,9 | 1,0 |
| Realkredittlánsbrøv | 2.084 | 97 | 4,6 | 59,5 |
| Kredittlánsbrøv IG | 122 | 10 | 8,3 | 3,5 |
| Hárentulánsbrøv | 224 | 21 | 9,4 | 6,4 |
| Alternativar íløgur | 225 | 2,0 | 1,0 | 6,4 |
| Onnur fíggjaraktiv | 154 | 5,0 | 3,0 | 4,4 |
| **Íløgur tilsamans** | **3.502** | **236** | **6,9** | **100,0** |

### Fíggjarmarknaðirnir í 2023 í stuttum

Aftaná eitt trupult og óvanligt ár á fíggjarmarknaðinum í 2022, gjørdist 2023 eitt gott ár hjá íleggjarum, serliga síðstu tveir mánaðirnar av árinum vóru góðir. Høvuðsorsøkin var, at FED; tann amerikanski miðbankin, gav tekin um, at nú fóru renturnar ikki at hækka meira og møguliga, at tær fóru at lækka aftur í 2024.

Fyrstu 10 mánaðirnir av árinum var nógvur ófriður á fíggjarmarknaðinum, við stórum sveiggjum. Óvissa var um inflatiónina og um rentuhækkingarnar hjá miðbankunum, fóru at geva afturgongd í búskapinum, ella um tað fór at eydnast at fáa eina sokallaða “bleyta” lending.

Tað er altíð trupult at siga nakað um útlitini fyri fíggjarmarknaðin, men í verandi støðu síggja útlitini í 2024 út til at vera hampiliga góð, um ikki okkurt óvæntað hendir.

## Skuld landskassans

Marknaðarvirðið av lánsbrævaskuld landskassans var við árslok 2023 3,9 mia. kr. Skuldin hjá landskassanum er sett saman av fýra lánsbrævarøðum. Ein skal rindast aftur í 2024 og hinar tríggjar skulu rindast aftur í 2025, 2026 og 2032. Talva 3 vísir tey fýra lánsbrævalánini, landskassin hevur.

*Talva 3 lánsbrævalán landskassans*

| | Nom. mió. kr. | Marknaðar-virði mió. kr. | Býtið |
|---|---|---|---|
| 3,625% FO LB 230627 | -900 | -925 | 22,0% |
| DKK Swap 1,81% *) | -448 | -349 | 10,9% |
| 1,25% FO-LB 240602 | -1.100 | -1.091 | 26,9% |
| 0,125% FO-LB 250602 | -1.645 | -1.579 | 40,2% |
| **Íløgur tilsamans** | **-4.093** | **-3.943** | **100,0%** |

Øll fýra lánsbrævalánini eru standandi lán, tað vil siga, at bara renta, og ikki avdráttur, verður goldin í lánitíðini. Lániupphæddin verður goldin aftur í einum, tá ið lánitíðin er av.

*Mynd 2 – Lánsbrævaskuld: Miðalrenta við ársenda*




Mynd 2 vísir miðalrentuna av teimum fýra lánunum við ársenda, sum landskassin rindar av lánsbrævaskuldini. Í 2023 rindaði landskassin í miðal 1,4% í rentu av sínum lánum, sum við ársenda 2023 høvdu eitt marknaðarvirði á 3,9 mia. kr. Rentan, sum Føroyar í miðal rindar fyri síni lán, er nógv minkað síðani 2011, tá landskassin í miðal rindaði gott 3% í rentu av síni skuld. Tó er

rentan hækka aftur í 2022 og 2023 og er tað orsakað av at rentustøðið er hækkað.

Landskassin rindaði í juni 2023 eitt lán aftur á 550 mió. kr. Hetta var gjørt við, at landskassin tók ein nýtt lán á 900 mió. kr., har 550 mió. kr. vóru brúktar til at rinda lánið aftur við, og restin, 350 mió. kr. var tikið til gjaldføri landskassans, soleiðis at tað var 15% av BTÚ, sum lógin sigur. Landskassans bruttoskuld økist við hesum, men ikki nettoskuldin, sum er skuld frátrekt gjaldføri.

Rentan á nýggja láninum er 3,625% og effektiva rentan er 3,7%, Lánið er eitt fýra ára lán. Næsta lán hjá landskassanum fellur til gjaldingar í juni 2024 og er 1,1 mia. kr. stórt. Lánið verður endurfíggjað við lántøku í mai.

**Nettoskuld landskassans**

Nettoogn landskassans við ársenda 2023 var 200 mió. kr. Marknaðarvirðið av lánsbræva-skuldini var 3,9 mia. kr., meðan gjaldførið var 4,1 mia. kr.

**Váðastýring**

Fyri at minka um rentuváðan, ansar landsbankin eftir at varleikin (rentuváðin) á lánsbrævaognunum og lánsbrævaskuldini ikki liggja ov langt frá hvørjum øðrum.

**Frítíðargrunnurin**

Í mars 2022 var lógin um frítíð við løn broytt, soleiðis at frítíðargrunnurin, sum fakfeløgini umsótu peningin hjá, varð avtikin og ein nýggj skipan var sett í verk. Tað er nú Taks sum umsitur bæði inngjøldini av frítíðar-peninginum, og eisini útgjøldini, við tað at Taks flytir løntakarunum uppspardu frítíðarlønina fyrst í mai á hvørjum ári. Í septembur 2023 gjørdi Landsbankin avtalu við Taks um at umsita uppspardu frítíðarlønina gjøgnum feriuárið. Landsbankin plaserar peningin á bankakonti, avtaluinnlán og í stutt realkredittlánsbørv, og syrgir fyri, at peningurin er tøkur hjá Taks fyrst í apríl.

## Kredittvirðið tað sama – Aa2

Ratingstovnurin Moody's kredittmetir Føroyar. Seinasta kredittmetingin er frá august 2023. Kredittmetingin var tann sama sum frammanundan, tað vil siga Aa2 við støðugum útlitum. Hetta er triðhægsta rating av 21 møguligum. Fyri at víðka um íleggjaraskaran er ein rating neyðug, og jú betri kredittmeting, jú lægri er rentan, tá ið landið skal taka lán. Kredittmetingin hjá landskassanum kann eisini brúkast sum útgangsstøði, tá ið fyritøkur og stovnar í Føroyum skulu taka lán í útlondum.

Moody's vitjar vanliga Føroyar eina ferð um árið, sum oftast í juni. Allar frágreiðingarnar hjá Moody's um Føroyar liggja á heimasíðuni hjá Landsbankanum, www.landsbankin.fo.

## Hvør brúkar, hvør sparir, hvør lænir?

Ein av høvuðsuppgávunum hjá Landsbanka-num er at hyggja nágreiniliga at, hvussu nógvir pengar eru ymsastaðni í samfelagnum, eitt nú í bankum, hjá húsarhaldum og hjá fyritøkum. Eisini verður hugt at, hvussu kapitalur ferðast, hvør eigur til góðar, hvør skyldar og javnvág millum skuld og ogn.

Í 2023 gjørdi Landsbankin, umframt árs-frágreiðingina, eina frágreiðing um fíggjarliga støðufestið fyri 1-3. ársfjórðing. Í 2024 er eisini ætlanin at greina fíggjarliga støðufestið hvønn ársfjórðing.

Fyri at taka samanum hevur landsbankin í 2023 í greiningum og tíðindaskrivum millum annað víst á[2]:

- At miðalrenta á landskassans skuld við ársenda 2022 var 0,7%. Væntast kann tó, at miðalrentan landskassin skal rinda fyri sína skuld fer at hækka næstu árini, nú tjóðbankarnir hava sett rentuna munandi upp. (11. apríl)
- At avkastið av ogn og skuld landskassans var nøktandi í 2022. Meðan avkastið av fíggjarognunum hevur verið vánaligt í 2022, so er avkastið av ogn og skuld tilsamans nøktandi.
- At vøksturin í útlánum frá føroysku bankunum hevur verið veksandi síðani miðjan 2022. Vøksturin 5,0% í februar 2023 og 9,5% í august 2023 roknað sum eitt 3 mánaðar miðaltal í mun til sama tíðarskeið árið fyri. (24 apríl og 13. oktobur)
- Tá ið útlánini hjá donsku peninga- og realkredittstovnunum verða løgd afturat útlánunum hjá føroysku bankunum, er samlaði útlánsvøksturin 5,7% í august 2023. (13. oktobur)
- At útlánini hjá føroysku bankunum eru økt við 1 mia. kr. frá mars 2022 til mars 2023. Føroysku bankarnir høvdu útlán fyri 17,7 mia. kr. í mars 2023, samanborið við 16,7 mia. kr. í mars 2022. (26. mai)
- At útlánini frá føroysku bankunum veksa ikki skjótari enn búskapurin. Útlánini hava stórt sæð síðani fíggjarkreppuna havt ein lægri vøkstur enn búskapurin. Hetta kann partvíst skyldast, at fyritøkurnar eru so mikið væl fyri í dag, at eftirspurningurin eftir fígging ikki er stórur, og partvíst tí bankarnir leggja kapital til síðis fyri at uppfylla kapitalkrøvini, ið eru herd síðani fíggjarkreppuna í 2008. (13. oktober)
- At útlán hjá føroyskum bankum til privata geiran vóru 62% av BTÚ við ársenda 2022. Útlán til privata geiran eru útlán til húsarhald og privat feløg (tað vil siga frároknað almenn feløg). Útlán frá útlendskum bankum til føroysk húsarhald og vinnu eru ikki við í uppgerðini. (13. oktobur)
- At innlánini frá føroysku kundum í føroysku bankunum framvegis hækka. Tey eru økt við góðum 1,2 mia. kr. í tíðarskeiðinum mars 2022 til mars 2023, tá samlaðu innlánini vóru 19,2 mia. kr. Tað eru húsarhaldini sum eiga meginpartin av innlánunum. (2. juni)
- At 80% av innlánunum hjá húsarhaldunum eru fevnd av innskjótaratrygdar-grunninum (16. oktobur)
- At samlaða innlánsyvirskotið í føroysku peningastovnunum lækkar. Tað var 1,8 mia. kr. í februar 2023. (24. apríl) og at tað var 1,4 mia. kr. í august 2023 samanborið við 2,1 mia. kr. í august 2022. Innlánsyvir-skotið eru innlán hjá føroysku peninga-stovnunum íroknað útlendskar deildir, frátrekt útlán hjá somu. (16. oktobur)
- At bankarnir hava nóg mikið av gjaldføri. Lyklatalið fyri gjaldførið eitur LCR (Liquidity Coverage Ratio) og skal vera 100%. Allir føroysku bankarnir høvdu væl meira í gjaldføri enn 100% við ársenda 2022. (28. apríl)
- At tað eru fá húsarhald, sum hava skuld omanfyri 3 ferðir sína inntøku í 2021. Av 18.700 húskjum eru tað 7,6% sum hava eitt skuldarlutfall omanfyri 3. Verður einans hugt eftir húskjum, sum hava skuld omanfyri 2 mió. kr., er talið av teimum við skuldarlutfalli omanfyri 3, 3,7%. (1. mai)
- Fyri 2022 vísa fyribils hagtøl at sama tal er er økt frá 3,7% til 4,1%. (24. oktobur)

[2] Sí frágreiðingarsavn. Leinkja á forsíðuni á www.landsbankin.fo

- At rentuútreiðslurnar eru øktar við 34 mió. kr. hjá húsarhaldunum í 2022 samanborið við 2021. Verður rentustuðulin drigin frá svarar tað til 22 mió. kr. Tað er ein vøkstur á 12% í mun til tað, sum var goldið av rentum á bústaðarlánum í 2021. (2. juni)
- At í august 2023 var rentan, sum føroysk húsarhald hava goldið av sínum sethúsa-lánum í føroysku bankunum og donsku realkredittstovnunum húsarhald í miðal 4,06. (24. oktober)
- At nøkur húskarhald raka rentuloftið, nú rentan er hækkað í fleiri stigum síðani á sumri 2022. Húsahald kunnu í mesta lagi fáa 35.000 í rentustuðli um árið. Er rentan til dømis 4%, er markið á 100.000 kr. í árligum rentuútreiðslum rokkið hjá teimum, sum skylda 2,5 mió. kr. í sethúsa-láni. Tey, ið hava sethúsalán størri enn 2,5 mió. kr., raka sostatt rentuloftið og fáa ikki rentustuðul fyri tær rentuútreiðslurnar, ið fara upp um 100.000 kr. árliga. (24. oktobur)
- At húsarhald velja heldur sethúsalán frá bankunum. Útlánini frá donsku realkredittstovnunum til føroyingar eru minkaði hetta seinasta árið, meðan føroysku bankarnir hava økt útlánini til húsarhaldini. (26 mai)
- At bústaðarbyrðan er økt. Bústaðarbyrðan er parturin av tøku inntøkuni, sum eitt par við tveimum børnum undir 7 ár nýtur uppá at gjalda sítt bústaðarlán. (4. mai)
- At útlánskanningin frá 3. ársfjórðingi 2023, har kredittstjórarnir í teimum fýra føroysku peningastovunum meta um broytingar í m.a. eftirspurningi eftir fígging, broytingar í kredittvirðinum ella í krøvunum til kredittvirðið hjá kundunum vísir, at krøvini eru herd, men eftirspurningurin er nærum óbroyttur. (20. oktober)
- At hóast stóra framgongd í búskapinum seinastu 10 árini, eru yvirskotini í almennu fyrisitingini og tænastuni sera avmarkaði. (9. mai)
- At Føroyar hevði avlop á vøru handilsjavnanum í 2022, hóast stórar prísbroytingar. Hóast innflutningurin vaks nógv í 2022, serliga orsakað av øktum innflutningsprísum, so vaks útflutningurin meira. (9. mai)
- At í 2021 vóru tað tænastuvinnurnar sum stóðu fyri meginpartinum av virðisøkingini í Føroyum. Tilfeingisvinnurnar stóðu fyri 16% av bruttovirðisøkingini, framleiðslu-vinnurnar fyri 21% og tænastuvinnurnar fyri heili 63% av bruttovirðisøkingini. (12. mai)
- At Føroyingar eiga 11,6 mia. kr. í eftirlønaruppsparing. Føroysk húsarhald eiga privata eftirlønaruppsparing í Føroyum á 9,3 mia. kr. og umleið 2,3 mia. kr. í eftirlønarupsparing í donskum pensjónsfeløgum. Tilsamans 11,6 mia. kr. og tað svarar til 46% av BTÚ í 2022. (12. juni)
- At stytta arbeiðsvikuna hevur serliga tvær búskaparligar avbjóðingar við sær. Onnur er fíggjarlig, hin er demografisk (starvsfólkalig). Ein styttri arbeiðsvika økir um kostnaðin til lønarútreiðslur og setur enn størri trýst á arbeiðsmarknaðin. 7. juni)

## Búskaparráðið

Síðan mai 2021 hevur Landsbankin verið skrivstova hjá Búskaparráðnum. Búskaparráðið gjørdi tvær konjunktur-frágreiðingar í 2023, eina í mars og eina í september[3]. Í frágreiðingunum vísur Búskaparráðið millum annað á, at:

- At búskapurin heldur støðið. Í 2022 var vøksturin í BTÚ 10,8% og stavaði í stóran mun frá øktum prísum. Tað eru ikki tekin um afturgongd í føroyska búskapinum. (1. mars)
- At búskapurin er væl fyri í løtuni. Lyklatølini vísa framvegis, at føroyski búskapurin er í framgongd. Framleiðslan (BTÚ í leypandi prísum) er mett at veksa 5,9% í 2023, arbeiðsloysið er søguliga lágt, samlaðu lønarútgjaldingarnar eru veksandi, tal av fólki í starvi setur met, og handilsjavnin hevur framhaldandi stórt yvirskot. (1. september)
- Víst á at landsins framleiðsla (BTÚ) nú eisini verður uppgjørt í føstum prísum og at Føroyar hevur havt ein realan búskaparligan vøkstur øll árini frá 2011 til 2021, tó umdantikið 2020, tá Covid-19 rakti. (6. mars)
- At úrslitini á fíggjarlógini eru ov vánalig. Hall á fíggjarlógini í 2023 og 2024 er ikki er nóg væl frágingið, tá ið føroyski búskapurin framvegis er í vøkstri við metlágum arbeiðsloysi og inntøkuvøkstri í landskassanum. (1. septembur)
- At politisku mynkugleikarnir eiga at áseta eitt hámark fyri vøkstri í almennum útreiðslum. Búskapar-ráðið mælir politisku skipanini til at seta í verk eitt fíggjarpolitiskt regluverk. Umráðandi er, at rakstrarútreiðslu-hámarkið verður sett øllum almenna geiranum undir einum, tað vil siga ikki bert fyri landskassan, men fyri landið og kommunurnar undir einum. Afturat einum rakstrarútreiðsluhámarki er skynsamt at gera eina framskriving av almennu inntøkunum og útreiðslunum, so hvørt sum politisk tiltøk verða skotin upp. Ikki bara eitt ár fram, men 10 og 20 ár fram í tíð, so tað verður avdúkað, um inntøkurnar og útreiðslurnar javnviga í framtíðini. (2. oktobur)
- At prísirnir framvegis veksa, men spakuligari. Í øðrum ársfjórðingi 2023 vaks brúkaraprístalið við 4,4%, og tað er munandi lægri enn vøksturin í brúkaraprístalinum hevur verið síðani annan ársfjórðing 2022. Í fyrsta ársfjórðingi 2023 var tað í mesta mun dýrkaðar matvørur, rentuútreiðslur og streymprísir, sum togaðu prísvøksturin upp, og í øðrum ársfjórðingi 2023 eru tað rentuhækkingar og dýrkaðar matvørur, sum gera seg galdandi. (22. septembur)
- At húsarhald eru væl fyri fíggjarliga, hóast stóran prísvøkstur. Føroysku peningastovnarnir siga eisini frá, at húsarhaldini ikki biðja um skáa í størri mun enn vanligt, og at trotini ikki eru størri, enn tey plaga at vera. Inflasjónin og renturnar hava verið søguliga lágar síðstu nógvu árini, samstundis sum lønirnar eru øktar. Tað hevur givið húsarhaldunum ein realllønarvøkstur. Reallønarvøksturin er tó minkaður við høgu inflasjónini í 2022. (14. mars)
- At húsarhaldini framvegis hava treysti, sambært nýggjastu brúakarakanningini hjá Hagstovuni. Samanborið við kanningina frá í januar 2023, eru húsarhaldini í hesi kanning frá juni mánaði vorðin eitt vet meira bjartskygd um sína egnu fíggjarstøðu komandi árið, um arbeiðsloysið og

[3] Sí frágreiðingarnar á heimasíðu Landsbankans undir Búskaparráðið, Frágreiðingar.

búskaparstøðuna sum heild í Føroyum. (8. september)

- At privata nýtslan stórst sæð er óbroytt í 2023. Tøl fyri kortnýtsluna hjá føroyingum uttanlands vísa hinvegin, at nýtslan hjá húsarhaldunum í útlondum hevur verið eins stór á sumri 2023, sum á sumri 2022, og tað bendir á, at húsarhaldini hava gott treysti. (22. septembur)
- At gerandisvørur fylla meira í privatu nýtsluni. 22.09.2023 - 10:00
- At treystið hjá vinnuni er lækkað, serliga hjá tilfeingisvinnuni, men eisini í handilsvinnuni og tænastuvinnuni. Í byggivinnuni sæst ein lækking í vísitalinum, men ávísin fyri byggivinnuna er tó hægri, enn miðalið fyri seinastu 15 árini. (29. septembur)
- At byggivinnan enn hevur avbjóðingar at útvega arbeiðsmegi. Búskaparáðið hevur áður víst á, at serskipanirnar, sum geva skattligan fyrimun hjá millum annað handverkarum at arbeiða uttanlands, ikki eru til gagns fyri føroysku byggivinnuna, tí tað er stórur eftirspurningur eftir skikkaðari arbeiðsmegi í byggivinnuni í Føroyum og trýst er á lønunum. (21. mars)
- Trot á arbeiðsmegi er ein stór avbjóðing fyri búskapin. Føroyar hava í longri tíð havt søguliga lágt arbeiðsloysi. Neyðugt er hjá myndugleikunum at arbeiða fyri at økja um arbeiðsútboðið og Búskaparráðið mælir til, at allar serskipanirnar, sum minka um arbeiðsútboðið, eiga at vera avtiknar. (6. oktobur)
- Formaðurin í búskaparráðnum hevur í grein víst á, at styttri arbeiðsvika krevur meira arbeiðsmegi og meira pening. (30. mai)
- At íløgurnar hjá almenna geiranum eiga at vera støðugar fyri at stabilisera gongdina í búskapinum. Tað hevði verið skynsamt, um politiska skipanin framdi eina ítøkiliga íløguætlan hjá øllum almenna geiranum undir einum. Hetta merkir, at politiska skipanin má raðfesta millum allar almennu íløgurnar, ið liggja fyri framman. (21. mars)
- At Føroyar er tað landið í heiminum við størstu íløgum í undirstøðukervið. Í 2019 vóru íløgur í undirstøðukervi í Føroyum 5,7% av BTÚ. Verður hetta tal samanborið við hagtøl hjá OECD, eru Føroyar tað landið í heiminum, sum ger størstu íløgurnar í undirstøðukervi. (24. mars)
- At neyðugt er at raðfesta íløgurnar í almenna geiranum. Talið av eldri fólki veksur munandi komandi 20 árini, og tað setur stórt trýst á útreiðslurnar til almannamál. Íløgur í almannaøkið hjá tí almenna eru tó truplar at fáa eyga á, samanborið við íløgur í undirstøðukervið. Tað hevði verið skynsamt, um politiska skipanin framdi eina ítøkiliga íløguætlan hjá øllum almenna geiranum undir einum. (24. mars)
- Ein framskriving av fólkatalinum í Føroyum vísir, at talið av eldri fólki veksur lutfalsliga skjótari, enn talið av fólki í arbeiðsførum aldri. Í 1988 vóru 6,5 fólk í arbeiðsførum aldri fyri hvønn pensjónist, meðan vit í dag eru 4 fólk fyri hvønn pensjónist. Um 40 ár verða vit einans 2 fólk í arbeiðsførum aldri fyri hvønn pensjónist. Gongdin í fólkatalinum fer serliga at økja um almennu útreiðslurnar til fólkapensjón og heilsu- og røktartænastur til eldri fólk. (24. mars)
- At haldførisavbjóðingin má handfarast, neyðugt er at fremja nýskipanir, sum betra um haldførið hjá landskassanum – longri vit bíða, størri verður rokningin, sum vit lata yngru ættarliðunum. Dømi um eina nýskipan, sum er neyðug fyri at betra um haldførið, er at hækka pensjónsaldurin meira enn tað, sum longu er samtykt. Tað ávirkar bæði inntøku- og útreiðslusíðu landskassans. (1. septembur)
- At umsitingin av botnfiskastovnunum ikki roynist væl. Heimaflotin er komin til eitt markamót, har tað er neyðugt at gera eina

haldgóða ætlan fyri, hvussu heimaflotin gerst burðardyggur, so hann gevur íkast til búskapin. Eftir ringa standinum á botnfiskastovnunum at døma, hevur umsitingin av botnfiskastovnunum ikki roynst væl. (10. mars)

- At umsitingarætlanin at stýra veiðistrýstinum ikki er nóg munagóð. Búskaparráðið ger vart við, at verandi skipan í umsitingarætlanini ikki er nóg munagóð, tá ið talið av fiskidøgum einans kann flytast 5% hvønn vegin. (10. mars)
- Búskaparráðið talar fyri, at tilfeingisgjald verður tikið inn fyri tey náttúrutilfeingi, sum Føroyar ráða yvir. Náttúrutilfeingi, ið eiga at verða viðgjørd á tílíkan hátt, kunnu vera livandi fiskatilfeingi, aliøki á firðum og á havøkjum, orkutilfeingi t.d. vatn-, vind- og streymasjóøki, og grundøki til vinnuligt brúk. (10. mars)

## Føroya Váðaráð og systemiskir váðar

Føroya Váðaráð hevur fýra fundir árliga og hevði seinasta fundin í novembur 2022. Váðaráðið hevur til uppgávu, eins og Landsbankin – við støði í greiningum – at eyðmerkja váðar. Meðan Landsbankin hyggur yvirskipað at váðum, hyggur Váðaráðið eftir *systemiskum* váðum.

Váðaráðið telur 5 limir og eru valdir fyri 4 ár. Fyrsta fýra ára skeiðið er runnið og ráðið er tí skipað av nýggjum. Limir í Føroya Váðaráðið eru:

- Malan Johansen, landsbankastjóri, forkvinna.
- Torben M. Andersen, professari, Århus Universitet.
- Bjørn R. Gudmundsson, skrivstovustjóri, Hagstofa Íslands.
- Jógvan Thomsen, stjóri Vinnustovnurin.
- Ragnfríð N. Anthoniussen, fulltrúi, Uttanríkis- og vinnumálaráðið.

Váðaráðið sendir út tíðindaskriv eftir hvønn fund, sum greiðir frá umrøddu evnunum. Tíðindaskrivini liggja á forsíðuni á heimasíðuni www.landsbankin.fo.

Váðaráðið vísti í 2023 millum annað á:

- At tað eru ikki greið tekin um at systemiskir váðar eru undir umbúnað í føroyska bankageiranum,
- At sethúsaeigarar ivaleyst eru kroystir fíggjarliga av høgu prís- og rentuhækkingunum seinastu tíðina, men teir raðfesta framvegis at gjalda niður skuld. Í januar 2023 var 95% av skuldini hjá húsarhaldum lán við avdráttum (mars).
- Rentan á bústaðarlánum er í miðal økt við 1,5 prosentstigum í tíðarskeiðinum september 2022 til september 2023 hjá føroyskum sethúsaeigarum. Rentan á bústaðarlánum hjá føroyskum húsarhaldum í føroysku bankunum og donsku realkredittstovnunum tilsamans, var 4,22% í miðal í september 2023. (desembur)
- Umleið ein fjórðingur av sethúsaskuldini hjá føroysku húsarhaldunum er í donskum realkredittstovnum, og rentan á hesum bústaðarlánunum var 3,1% í miðal í september 2023, meðan rentan á bústaðarlánunum í føroysku bankunum í miðal var 4,7% í sama tíðarskeiði. (desembur)
- 86% av húsarhaldunum hava lán við skiftandi rentu, og tí ávirkar rentuhækkingin skjótt føstu útreiðslurnar hjá húsarhaldunum (mai).
- At flestu húsarhaldini sambært bankunum eru fíggjarliga væl fyri; tey gjalda skuld niður og biðja ikki í størri mun enn vanligt, um skáar, og eftirstøðurnar eru ikki fleiri, enn vanligt.

- At vøksturin í útlánum frá føroysku bankunum hevur verið veksandi síðani miðjan 2022 og var hann 4,6% í januar 2023. Útlánsvøksturin stavar í løtuni frá útlánum til privatar fyritøkur og húsarhald. (mars)
- Í mars var útlánsvøksturin 5,5%, og 2,6%, tá danskir pening- og realkredittstovnar eru taldir við (mai).
- At útlánsvøksturin hjá føroysku bankunum er øktur til 8,1% i juli 2023 samanborið við sama tíðarskeið í 2022, ið bæði stavar frá øktum eftirspurningi frá húsarhaldum og frá øktum útlánum til kommunurnar og vinnuna. Útlánsvøksturin er 4,3% um útlán frá donskum peninga- og realkreditt-stovnum verða tald uppí (septembur).
- Útlánsvøksturin hjá føroysku bankunum er øktur og var 9,8% í oktober 2023, og 5,7% um útlánini frá donsku peninga- og realkredittstovnunum verða tald við (desembur).
- Útlánsvøksturin í føroysku bankunum var í oktober togaður upp av útlánum til kommunurnar, húsarhaldini og almennu feløgini. Privata vinnan hevur eisini økt um lántøkuna, men útlánsvøksturin til privatu vinnuna er lutfalsliga lágur. (desembur)
- Vøksturin í innlánum hjá føroysku húsarhaldunum var í juli 2023 á sama støði sum við endan av 2021. (septembur)
- At føroysk húsarhald velja í størri mun, enn áður, føroysk bústaðarlán framum donsk realkredittlán, tá tey skulu fíggja keyp av bústaði. Fyri einum ári síðani (í juli 2022), var 34% av bústaðarskuldini hjá føroyingum til danskar realkreditstovnar, meðan tað í juli 2023 var 30%.
- Støðan í føroyska búskapinum er góð, men høgu renturnar kunnu fara at ávirka sethúsaprísirnar, ið eins og í øðrum londum, hava stóran týdning fyri bjartskygnið hjá húsarhaldunum og harvið privatu nýtsluna, sum í seinasta enda ávirkar búskapin. (desembur)
- Stóru príshækkingarnar, ið hava verið seinastu nærum 10 árini á sethúsa-marknaðinum, standa nú í stað ella eru lækkandi. Verða sethúsaprísirnir fram til triðja ársfjórðing 2023 samanbornir við sethúsaprísunum í sama tíðarskeiði í 2022, eru prísirnir á sethúsum í Tórshavn lækkaðir við 2% (desembur).
- Føroya Váðaráð hevur hugt eftir innlánunum í føroysku bankunum og staðfestir, at ein stórur partur av innlánunum eru tryggjaði, ið merkir, at tey eru vard av Innskjótaratrygdargrunninum.
- Føroysku bankarnir hava í 2022 sett minni av móti tapi á lánum og veðhaldum samanborið við í 2021 (mai).
- Niðurskrivingarnar hjá føroysku bankunum eru higartil í 2023 á sama støði, sum í 2022, og eitt vet lægri, enn í 2021. Sostatt eru ikki munandi broytingar í niðurskrivingunum, hóast bæði inflasjónin og rentan eru økt. (desembur)
- At í november 2022 høvdu íslendskir bankar útlán fyri 790 mió. kr. til føroyska vinnulívið. Til samanbering hevur vinnan lán fyri 6,8 mia. kr. í føroysku bankunum (mars).
- At útlánskanningin vísir, at allir fýra føroysku peningastovnarnir í øðrum ársfjórðingi 2023 hava hert síni kredittkrøv mótvegis kundunum gjøgnum øktar útlánsrentur, men at teir hóast tað ikki merkja nakra broyting í eftirspurninginum frá kundunum.

Samanborið við landsbankan og búskaparráðið, sum eru ráðgevandi, hevur váðaráðið nøkur amboð. Váðaráðið kann geva

eina eygbering, eina ávaring og eitt tilmæli[4] umframt at geva danska váðaráðnum úttalilsi, tá tað viðvíkir donskum málsøki.

Í 2021 brúkti váðaráðið fyri fyrstu ferð amboðið eygbering. Váðaráðið vísur á, at tað kann vera ein váði at tveir myndugleikar hava eftirlit við Betri samtakinum, sum kann ávirka fíggjarliga støðufestið í Føroyum.[5]

## Fíggjarviðurskifti Landsbankans

Frá 2022 er Landsbankin á fíggjarlógini, sum ein vanligur stovnur. Játtanin er á tveimum stovnsnumrum Landsbanki Føroya og Inntøkufíggjað virksemi, Landsbanki Føroya. Samlaða inntøkujáttanin var í 2022 1,6 mió. kr. meðan samlaða útreiðslujáttanin var 10,1 mió. kr., tvs. ein nettojáttan á 8,5 mió. kr.

Samlaðu útreiðslurnar hjá Landsbankanum vóru 10,2 mió. kr. í 2023 samanborið við 9,2 mió. kr. í 2022. Av teimum 10,2 mió. kr. vóru 7,7 mió. kr. lønir (7,1 í 2022) og keyp av vørum og tænastum v.m. vóru 2,4 mió. kr. (2,2 mió. kr. í 2022). Keyp av vørum og tænastum er í stóran mun útreiðslur til KT, virðisbrævabókhald og aðra sakkøna hjálp. Í 2023 skipaði Búskaparráðið fyri eini ráðstevnu, og eisini var serstøk hjálp keypt til fólkatalsframskrivingina, sum var neyðug til frágreiðingina um haldføri.

Á inntøkusíðuni er játtanin 1,6 mió. kr., men inntøkan gjørdist 1,8 mió. kr. Landsbankin fær inntøkur av at umsita Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og av at umsita ogn hjá almennum grunnum. Netto vóru útreiðslurnar tí 8,4 mió. kr., 100 tkr minni enn játtað.

[4] Sí meira um hetta á heimasíðu Landsbankans undir amboðum hjá Føroya Váðaráði.

[5] Sí https://www.landsbankin.fo/fo-fo/eygbering